Or›alisti

Or› i› ver›a n‡tt í K.T.Horninum

Alnet	Internet
Breyt	Bus
Datagrunnur	Database
Disklastø›	Diskettedrev
Fílaflutningur/fílaveiting	Filoverførsel
Flís	Chip
Forrit	Program
Gei›slaprentari	Laserprinter
Geril	Processor
Grind	Portal
Heimsta›ur/heimaøki	Domæne
Húsi	Kabinet
Innara goymsla	Interne hukommelse (RAM)
Ímynd	Ikon
Kervi	Netværk
Kjaksí›ur	Diskussionsgrupper
Klokkutídd	Clockfrekvens
Knappabor›	Tastatur
Leitibúna›ur	Browser
Leitimaskina/Netleitari	Søgemaskine
Ljóslesari	Scanner
Lutbúna›ur	Sharewareprogram
Margmi›il	Multimedia
Minni	Memory/RAM
Móthald	Modem
Ravtøkni	Elektronikkur
Ritbúna›ur	Software
Rógva út	Surfe
Rótin	Roden
Samanseting	Konfiguration
Samvirki	Interactivt
Talgildismyndatóli	Digitalt kamera
Telduprent forriti	Desktop Publishing
Tí›indasí›ur	Nyhedsgrupper
Tólbúna›ur	Hardware
Ytra goymsla	Ekstern hukommelse (t.d. HD)

Topp 10 listin

Hesafer› yvir mest vitja›u heimasí›urnar frá www.in.fo

1. Faroe Publisher
Hits: 443 **Url:** kort.olivant.fo/~bbrockie/
2. Home of Hans
Hits: 425 **Url:**heima.olivant.fo/~hans
3. Leitel
Hits: 423 **Url:** www.leitel.fo
4. Chat á #Faroese_Chat
Hits: 286 **Url:** www.leitel.fo/chat/
5. Netsmi›jan
Hits: 250 **Url:** www.netsmidjan.com
6. Todi Jónsson - fjepparasí›a
Hits: 239 **Url:** www.todi.subnet.dk
7. Cruisarin
Hits: 222 **Url:** kort.olivant.fo/~rnielsen
8. Inventartænastan
Hits: 205 **Url:** www.inventar.fo
9. Færøsk-Dansk Specialordbog
Hits: 201 **Url:** www.geocities.com/kurtmadsen
10. Tann Føroyski TOPP-10 listin
Hits: 197 **Url:** www.topp-10.com/

Kelda: www.in.fo

Káta Horni›

Eitt er at rokna alt út, eitt anna› er skynsemi. Vit hava hesafer› sett eina teldu at finna nakrar skynsamar loysnir. Ta› fyrsta vit bó›u telduna um var at finna 6 tær minstu bøkurnar í heiminum. Sí›an fekk teldan bo› um at seta nøkur roknistykki upp. Hesi eru úrslitini:

6 tær minstu bøkurnar:
Unix á ein lættan hátt
Hvussu Etiopiarar kunnu st‡ra heiminum
Alt menn vita um konufólk
Moralur og etikkur, eftir Bill Clinton
Hvussu ein kann halda sær á toppinum, eftir Art Garfunkel
Skoritriks, eftir Mike Tyson

Nøkur skynsom roknistykki
Klókur ma›ur + klók kona = romansa
Klókur ma›ur + b‡tt kona = uppá vegin
B‡ttur ma›ur + klók kona = uttangar›s
B‡ttur ma›ur + b‡tt kona = giftarmál

Klókur stjóri + klókur arbei›sma›ur = yvirskot
Klókur stjóri + b‡ttur arbei›sma›ur = framlei›sla
B‡ttur stjóri + klókur arbei›sma›ur = reklama
B‡ttur stjóri + b‡ttur arbei›sma›ur = yvirtí›

Tema: Teldukeyp

6. partur – Okkara dáta

Hesafer› skriva vit eitt sindur um dátast‡ring og hvussu vit kunnu fáa sum mest burtur úr okkara har›diski. Umframt ta› so grei›a vit eitt sindur frá um virus og hvussu vit kunnu verja okkum móti virus.

Dátast‡ring
Tá tú brúkar tína teldu, er ta› umrá›andi at halda skil á har›diskinum. Har›diskarnir í dag eru rættuliga stórir, og kunnu goyma fleiri hundra› forrit og fleiri túsund fílur. Um tú bara goymir á har›diskinum uttan at skipa fílurnar, gongur ikki lang tí› fyrr enn tú ikki fær skil á tí sum er goymt. Tí er ta› sera ney›ugt at hava ein træstruktur. Á flestu teldum vi› Windows, er ein træstrukturur longu frá.

Tá Windows ver›ur lagt á telduna, ver›ur eitt træ gjørt, har øll undirforrit ver›a skipa› skilagott, vi› einum gó›um yvirliti. Hetta kann man síggja vi› at opna forriti› "Stifinder". Træi› sæst uttast til vinstru á skerminum.

Ta› fyrsta stigi› í træstrukturinum kallast "rótin". Rótin er altí› har tá har›diskurin er formatera›u, og inniheldur millum anna› nakrar ney›ugar uppstartfílur, sum man als ikki má sletta.

Umframt ta› liggja nakrar mappur sum hoyra til st‡risskipanina – fyrst og fremst sjálv windowsmappan vi› nógvum undirmappum til ymiskar fílur, i› hoyra til st‡risskipanina. Her eigur man ikki at leggja forrit og skjøl inn. Harafturat er ein mappa sum eitur "Programmer", sum inniheldur tey flestu av teimum forritium og skipanum, sum eru løgd inn á telduna; aftur vi› hvør sínari undirmappu. Her kann man leggja tey forrit, sum man ætlar at leggja á telduna.

Ta› kunnu ver›a fleiri mappir vi› ambo›sforritum, sum fylgja vi› telduni tá hon er keypt. Tá n‡ggj forrit ver›a løgd inn á telduna, ver›ur sum oftast ein n‡ggj mappa gjørd undir innleggingini og n‡ggja forriti› lagt í hana. Nøkur Windows-forrit gera undirmappur í mappuni "Programmer", tí hon altí› er har, tá Windows 95/98 er innlagt, me›an onnur gera eina mappu á rótini á har›diskinum.

Um eitt forrit ikki brúkar eitt innleggingarforrit, skal tú sjálvur leggja ta› inn á har›diskin. Um so er skal tú altí› gera eina mappu á›renn og sí›an leggja forriti› inn í n‡ggju mappuna.

Forrit og datafílur
Forrit og datafílur (skjøl) eru bæ›i fílur, men vi› hvør sínari funktión. Eitt forrit er ein fíla, sum kann startasst og gera ymiskar instruktiónir. Ein dátafíla er eitt úrslit av at man hevur gjørt eitt arbei›i í einum forriti og goymt ta› lidna abrei›i í einari fílu. Til dømis at tú skrivar ein tekst í einum tekstvi›ger›arforriti, og teir tekstir man hevur skriva› goymir forriti› í dátafílum.

Navni› á forritafílum endar sum oftast vi› .EXE. Til dømis "Notesblok" forriti›, sum fylgir vi› Windows, eitur NOTEPAD.EXE. Endingin EXE merkir Executable, á føroyskum merkir ta› at ta› er møguligt at koyra forriti› í gongd.

Albøting (Optimering) av har›diskinum og trygdaravrit
Tá man leggur n‡ggj forrit inn á telduna, ella slettar gomul forrit, eigur man altí› at gera ta› vi› at brúka forriti› "Tilføj/Fjern programmer" sum fylgir vi› Windows, og sum liggur undir "Start/Indstillinger/kontrolpanel". Men so vi› og vi› ver›ur ta› rættuliga rótut á har›diskinum, tí tey forrit sum man slettar, lata eitt tómt pláss liggja eftir, og tey n‡ggju forritini man leggur inn á telduna, passa ikki altí› í hesi tómu pláss. Tí hevur Windows eisini eitt forrit sum eitur "Diskfragmentering", sum er eitt gott ambo›. Hetta forrit eigur man at seta í gongd av og á. Forriti› leggur fílurnar á har›diskinum saman, solei›is at man fær nógv betur pláss og at st‡risskipanin hevur nógv skjótari at seta forritini ígongd. Windows 98 hevur harafturat eitt ambo›sforrit, sum eitur "Diskoprydning". Vi› tí forritinum ber til at sletta fílur, sum ikki ver›a brúktar longur og tí ikki eru ney›ugar.

Windows hevur eisini eitt forrit, sum eitur "Scandisk". Ta› eigur man eisini at seta í gongd av og á, tí ta› kannar har›diskin fyri feilir, umframt at kanna allar fílur um tær eru í ordan. Á›renn man setur Scandiskforriti› í gongd, eigur man at taka eitt trygdaravrit (backup) av øllum dátafílum – til dømis skjøl og rokniørk – tí ta› kann ganga gali›, solei›is at man missur onkrar fílur.

Ta› er skilagott at taka trygdaravrit av øllum skjølum vi› meira. Forrit hevur man sum oftast avrit av á fløgu ella disklum.

Nakrar teldur hava eina fløgu sum kallast "Reetablerings-CD". Um ta› gongur gali› og man missir onkrar fílur, so ber til at seta hesa fløguna í fløguspælaran og starta telduna upp av n‡ggjum. Tá kemur alt, sum upprunaliga var› lagt á telduna, inn aftur. Um man ikki hevur hesa serligu fløgu (ella diskil), má man sjálvur innleggja ta›, sum er oy›ilagt.

Dátafílur skulu undir øllum umstø›um leggjast innaftur, um ta› er hent naka› vi› teimum.

Virusverja

Sjálvt um øll tosa um virus, so eru ta› bert fá sum hava roynt at fingi› ta›. Ikki tí, ta› er sera ótespuligt til dømis at har›diskurin brádliga ver›ur sletta›ur. Man kann bert fáa virus vi› forritum, ta› vil siga, fílum sum enda vi› ".EXE" ella ".COM", og virussi› kann bert setast í gongd vi› at hesi forrit ver›a aktivera›i.

Tann mest vanligi smittuvegurin í dag er um Alneti›. Eisini eru smáu disklarnir ein smittukelda, sum vit skulu hava í huganum.

Virus er eitt líti› forrit, sum fær telduna og/ella skermmyndina at bera seg undarliga at.

Tann besta verjan ímóti virus eru tey sokalla›u antivirus forritini. Tey kunnu keypast ella fáast sum lutbúna›arforrit (shareware program). Av tí at ta› javnan koma n‡ggj virus, ver›a antivirusforritini javnan dagførd, ella man fær eina fílu vi› n‡ggjastu vaccinini móti n‡ggju virusunum. Ta› er eisini sera umrá›andi at hava trygdaravrit av teimum dáta, sum ikki eru so løtt at endurskapa.

sid@sosialurin.fo
kelda: www.fs.dk

Smátí›indi:

Chatta vi› tey kendu

Hvønn hósdag klokkan 16.00 ber til at hitta kendar og spennandi tónleikarar í livandi lívi. Tá klokkan blívur 4 fer ein ein sonevndur G-Chattur í gongd, og mannagongdin er einføld, tú spyrt og teir kendu luttakarnir svara.

Talan er um eina Chattrás, i› danska vikubla›i› Gaffa skipar fyri, og sló›in er: www.g.dk

Tey sum higartil hava sta›i› fyri skotum eru millum onnur, Maria Montell, Daze og Kashmir.

Heimasí›an hevur eisini eina sonevnda Hall of Fame har til ber at lesa gomul chatt.

Maria Montell og onnur svara spurningum á www.g.dk, i› er chatt-rás fyri tey tónleikaáhuga›u

rin í Skúgvoy

Manbjørn Tórarenni ætlar sær at halda fram sum ortopediskur skósmiður so leingi hann megnar. Arbeiðslív hansara hevur verið merkt av drúgvum stríði við almennu myndugleikarnar
Mynd: Jens Kristian Vang

flestu teirra almikið. Hvussu nógv skógvarnir kosta vil Manbjørn undir ongum umstøðum siga. Men Sosialurin skilir, at meðalkostnaðurin liggur um 10.000 krónur. Prísurin vísir, hvussu kravmikið tað er at gera nýtiligar skógvar til brekaðar føtur.

Ongan almennan stuðul
Manbjørn kennir seg at hava verið í ævigum stríði við tað almenna. Bara tað at sleppa at endurútbúgva seg kravdi sum kunnugt nógv av Manbirni. Hóast hann kom til Føroya við einum sjáldsama góðum prógvi í hondini, tóku trupulleikar seg kortini upp við tað almenna. Orsøkin til, at hann valdi at fara undir endurútbúgving, var, at hann helt seg vera alt ov ungan til ivalidrentu. Men tá ið hann var endurútbúgvin, vildi hitt almenna ikki stuðla honum longur. Tó so, honum vórðu lovaðar 250.000 krónur úr landskassanum at byrja virksemið við. Men myndugleikarnir settu treytir.

– Táverandi landsstýrismaður í almannamálum, Eilif Samuelsen, kravdi, at eg skuldi búgva í Kollafirði, tí eg skuldi vera so nær miðstaðarøkinum. Tá ið eg skuldi skriva undir leigusáttmálan har, vísti tað seg, at leigan var alt ov dýr. Eg fekk ongantíð nakrar pengar. Teir vórðu í staðin brúktir til verkstað á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, minnist Manbjørn.

Hetta kom fram tá ið ein politikari spurdi avvarandi landsstýrismann, hví Manbjørn ikki fekk sína játtan.

Varandi neyðloysn
Í 1983 var Manbjørn hóast vánaliga byrðin komin so frægt áleiðis, at hann kundi fara undir at gera ortopediskar skógvar í Leirvík, haðani konan var ættað. Men hjúnarskilnaður hevði við sær, at Manbjørn flutti til Skúgvoyar aftur fyrst í nítiárunum. Flytingin var ein neyðloysn, sum seinni gjørdist varandi hjá tí nú 62 ára gamla skúgvoyinginum.

Almannastovan talaði at
Tað hevur eftir øllum at døma stóran týdning fyri viðskiftafólkini hjá Manbirni, at skógvarnir hava so nýmótans snið sum gjørligt. Tað noyddist Manbjørn at sanna, tá ið hann hevði arbeitt nøkur ár í Skúgvoy. Og tað gav at bíta í 1994, tá ið hann var við at spæla sær av við samstarvið við tað almenna. Almannastovuna gjørdi tá vart við, at viðskiftafólk vóru ónøgd við skósniðið og eisini við framleiðslutíðina, ið summi teirra hildu vera ov drúgva. Almannastovan hevði avgjørt, at tað ikki vildi mæla nýggjum viðskiftafólki til at brúka Manbjørn. Hetta var sambært Manbirni tað sama sum at taka livibreyðið út munninum á sær.

Skeivar skuldsetingar
Enn einaferð kom Manbjørn í stríð við teir almennu myndugleikarnar. Í einum brævi til Manbjørn frá 1994 skrivar Almannastovan, at Manbjørn Tórarenni ikki er útbúgvin ortopediskur skómakari. Hetta hóast, at Manbjørn hevur sveinabræv, har tað stendur, at hann hevur lokið læruna sum Ortopediskósmiður við rósi og heiðurstekini; sum sjálvur Maersk Mckinney handaði skúgvoyinginum. Tað árið var Manbjørn einsamallur skómakari, ið fekk heiðurstekin. Men Almannastovan helt ikki, at hann var rættiliga útbúgvin, tí hann ikki hevði arbeitt tvey ár hjá nøkrum góðkendum ortopediskósmiði, sum kravt var í Danmørk.

Manbjørn kendi seg sum vera man traðkaðan á tærnar av hesum orðum. Men Almannastovan noyddist kortini at taka skuldsetingina aftur. Manbjørn *er* ortopediskómakari.

Fleiri snið
Eftir drúgvt orðaskifti millum partarnar, varð ein fyribilsloysn funnin. Landsstýrismaðurin í Almannamálum avgjørdi, at Almannastovan ikki skuldi mæla fólki til at brúka nakran ávísan skósmið. Fólk skuldu velja frítt. Manbjørn tók avleiðingina av hesum og lat síðani yvirpartin á skónum seyma í Danmørk. Við hesum fingu viðskiftafólkini hjá Manbirni møguleika at velja millum at kalla øll skógvasnið.

Ein spurningur um kenslur
Manbjørn misti fleiri viðskiftafólk eftir stríðið við Almannastovuna. Men hann sigur seg kortini hava fingið fleiri onnur. Eisini eru summi fyrrverandi viðskiftafólk komin aftur til skómakaran í Skúgvoy. Orsøkina sigur Manbjørn vera, at skógvarnir hjá donsku kappingarneytanum ikki eru nóg góðir at ganga í, hóast teir kanska eru smartir.

– Tað er tað, sum eg sigi: Man skal ikki hurra tingini ígjøgnum! Man skal brúka bæði hendur og høvd, og alla tíð má man hava anatomiina og ortopediina í huga, sigur Manbjørn, ið heldur seg hava nógv at bjóða viðskiftafólkum sínum, sum stóri danski kappingarneytin ikki megnar.

– Man følir nakað fyri hesum fólkum. Eg kenni nógv teirra heilt væl. Tá ið eg gangi í Havn ella á Tvøroyri, so siga tey, »hey, Manbjørn«, og um vetrarnar ringja tey gomlu til mín at frætta tíðindi, sigur hann.

Heldur fram
Hóast nógv av viðskiftafólkum hansara eru eldri fólk, stúrir Manbjørn ikki fyri minkandi virksemi. Í fjør misti hann níggju keyparar; tey flestu vóru eldri fólk, sum løgdu árarnar inn. Men seinasta hálva árið hevur Manbjørn fingið nakrar nýggjar keyparar.

– Eg haldi fram so leingi, sum eg orki, staðfestir Manbjørn.

Útvarpslurtarar skulu tískil vænta sær, at lýsingin um ferðandi skómakaran í Skúgvoy enn sum áður fer at verða lisin.